# STÓRUR COUNTRY-DANSUR

ARGJA BÓLTFELAG 1973

Argja Bóltfelag skipar fyri stórum Country-dansi í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið 26. januar.

Luttakandi bólkar eru: Hallur Joensen Band, Ragnar í Vík og Twilight.

Øllum verður ynskt eitt gott nýggjár.

Vinarliga Argja Bóltfelag

# Projektleiðarar og forritarar til Elektron

**Nógva ferðin í samfelagnum setur okkum stór krøv. Spennandi krøv. Tí økist og mennist eisini virksemið hjá P/F Elektron skjótt. Og her er tað, at vit hava brúk fyri tær sum projektleiðara ella forritara. Ovmikið er at gera, so vit ynskja at seta fleiri fólk í starv á báðum økjum.**

Vit raðfesta trivnaðin høgt. Her skal starvsfólkið trívast; fáa hóskandi avbjóðingar og hava møguleikan at menna seg fakliga eins og persónliga. Vit vilja eisini, at starvsfólkið er eyðkent fyri sín eldhuga, ábyrgdarsemi og hugin at vera til tænastu.

## PROJEKTLEIÐARAR

Arbeiða við at menna ymsu skipaninar saman við okkara dugnaligu starvsfólkum á Menningardeildini. Vit síggja fyri okkum, at tú ert ein sjálvstøðugur persónur, sum hugsar í loysnum, ert nærlagdur og málsøkin. Eisini er samstarv ein av tínum dygdum, eins og samskifti er tað í bæði skrivt og talu.

## WEB/.NET & HOST- FORRITARAR

Fara at fáa avbjóðandi og fjølbroyttar uppgávur í tí livandi og góða umhvørvinum á Menningardeildini, har 25 fólk starvast. Deildin veitir skipanir og tænastur til føroysku peningastovnarnar og almennar stovnar.

Vilt tú verða Web/.Net forritari hjá okkum, er tað ein fyrimunur, um tú hevur royndir við til dømis .NET, C#, VB, SQL, XML, AJAX, JAVA, Sharepoint og Web-tænastur.
Er tú hinvegin Host forritari, hugsa vit okkum, at tú áður hevur arbeitt við eitt nú PL1, CICS og DB2.

Vilt tú vita meira um størvini, ert tú vælkomin at seta seg í samband við Sámal Samuelsen, tlf. 345 108. T-postur: samals@elektron.fo.

## UMSÓKNARFREIST

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagið á middegi mánadagin 7. januar 2008. Send umsóknina til P/f Elektron, Staravegur 9, Postboks 3219, FO-110 Tórshavn, att: Ulla Joensen. Ella við telduposti til ulla@elektron.fo.

Stephanssons Hús

P/f Elektron er millum landsins størstu veitarar av KT-tænastum til fíggjarfyritøkur, almennar stovnar og vinnuvirkir. Umframt at menna skipanarloysnir, veita vit tænastur innan infrastruktur og ymiskar hostingloysnir. Visiónin er, at okkara skipanar- og tænastuveitingar hava við sær, at kundin kann fremja framúr avrik á sínum virkisøki, samstundis sum trygdin og rakstrarstøðufesti eru í topp. 90 fólk starvast hjá P/f Elektron.

Elektron

# SMS ynskir øllum eitt Gott nýggjár

SMS